# Bussleiðin er víðkað

12. septembur var grein í Sosialinum undir heitinum »Fimm minuttir ov langt burturi«, hon var um at tann dagin, lat størsti parturin av Velbastaðbúgvum og Kirkjubøbúgvum Tórshavnar Kommunu undirskriftir. Nú er ynskið hjá bygdafólkinum, um at fáa tveir eyka bussar gingið á møtið. Í dag byrja hesir bussar at koyra. Tað var samtykt í teknisku nevnd hjá kommununi fyri nøkrum døgum síðani. Hugsast kann at fólkini í syðstu bygdunum í Tórshavnar Kommunu verða glað fyri hetta.




# Ongi deyv eru arbeiðsleys

**Í londunum rundanum okkum eru hagtøl, ið vísa at omanfyri 60 prosent av øllum teimum deyvu, ikki eru virkin á arbeiðsmarknaðinum. Soleiðis er ikki í Føroyum. So gott sum ongin deyvur er arbeiðsleysur**

ARBEIÐI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tað er ikki vanligt í grannalondum okkara, at tey deyvu eru í føstum starvið, men soleiðis er ikki í Føroyum. So gott sum øll eru á ein ella annan hátt virkin á arbeiðsmarknaðinum, og tað er sjálvandi áhugavert, tá vit hugsa um støðuna í grannalondunum, har fleiri enn 60 prosent av teimum, ið hava hoyribrek eru arbeiðsleys.

Sambært Edny Poulsen, sum er tolkur, er orsøkin fyrst og fremst, at tey deyvu eru meira integreraði í samfelagið her, enn tey eru í grannalondunum, og at tað á onkran hátt er meira góðtikið, at fólk bera brek.

## Fá deyv í Føroyum

Men ein onnur grund, kundi sambært Edny Poulsen verið, at tað eru so fá deyv. Tey eru bert nøkur og tredivu. Tað skuldu tó verið nøkur fleiri, tí vanligt er at ein av hvørjum túsund er deyvur, og tí skuldu tað hagtalsliga verið eini 50 deyv fólk í Føroyum.

- Vit mugu minnast til, at søgan hjá teimum deyvu fyrst og fremst liggur í Danmark, og tað er høvuðsorsøkin til, at tað ikki eru so nógv deyv í Føroyum, sum tað hagtalsliga skuldu verið, sigur Edny Poulsen.

Hon leggur afturat, at tað ikki eru so nógv deyv í Føroyum, sum eru farin frá fyri aldur, tí tað eru júst hesi, sum fóru til Danmarkar sum ung, og ikki vendu heimaftur.

– Síðani tey deyvu fingu møguleika at vera verandi í Føroyum, eru sera fá flutt av landinum. Hetta kemst av, at tey hava fingið møguleikar, eru góðtikin í samfelagnum og eru sloppin at nýta síni evnir í Føroyum, sigur Edny Poulsen.

## Øll kenna onkran deyvan

Tað deyvu gera nógv ymisk arbeiðir. Tey eru til dømis snikkarar, stuðlar og sunnheithjálparar. Orsøkin til at so nógv fólk eru í arbeiði, er sambært Edny Poulsen, at tey sleppa framat.

- Tey deyvu í Føroyum eru so mikið sjónlig. Næstan øll kenna onkran deyvan, og tí hava tey lættari við at vera góðtikin. Arbeiðspláss eru heldur ikki bangin fyri at seta deyv, tí tey vita, at tað so gott sum altíð ber til at fáa tolk, og tí er uppgávan minni møtumikil, sigur Edny Poulsen.

Sambært Edny Poulsen, er tað soleiðis í Danmark, at tey deyvu er so mikið nógv í tali, at tey hava sera lætt við at vera eitt slag av sermentan, har tey ikki hava so nógv samband við hoyrandi. Soleiðis kunnu tey ikki gera í Føroyum, tí tey er so mikið fá, at flestu fólkini, tey hava samband við eru hoyrandi.

- Tey eru jú bara nøkur og tredivu, so tað sigur seg sjálvt, at tey mest koma í kontakt við hoyrandi. Eisini eru tey sera røsk at nýta síni rættindi, og tað hjálpir teimum sjálvandi eisini, tá tey skulu vera ein náttúrligur partur av samfelagnum, sigur Edny Poulsen, tolkur.

# Tað er annað lív í F

**Gudrun Olesen er fødd í Grønlandi, uppvaksin í Danmark og býr nú í Føroyum við sínum føroyska manni. Í dag arbeiðir hon sum heilsuhjálpari á eldrasambýlinum oman Hoydalar. Hon greiðir okkum frá, hvussu tað er at liva sum deyvur í Føroyum**

DEYV Í ARBEIÐI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*
*myndir: Álvur Haraldsen*



Hinumegin borðið situr Gudrun Olesen, við høgru lið situr Edny Poulsen, sum er tolkurin til høvið. Orsøkin til, at vit hava tolk, er at Gudrun gjørdist deyv sum tvey ára gomul. Men tá vit koma í gongd at práta blívur tolkurin næstan burtur.

Gudrun leggur ikki fingrarnar ímillum. Hon byrjar beinanvegin at greiða frá, hvussu hon sum heilt ung flutti til Danmarkar. Hvussu uppvøksturin sum deyv var og so framvegis.

Hon greiðir frá, at hon hevði tað gott niðri í Danmark, og at serliga samanhaldið millum tey deyvu var sera gott. Men at tey deyvu á onkran hátt ikki høvdu so nógv samband við tey hoyrandi.

Niðri í Danmark gekk Gurdun Olesen í HF og á háskúla fyri deyv. Og eisini nam hon sær útbúgving sum heilsuhjálpari í tíðini í Danmark.

- Tað var lætt at vera deyv í Danmark, tí mann fekk tolk, tá mann hevði tørv á tí, men eg føldi, at eg misti mín grønlendska samleika, og tí valdi eg at flyta til Grønlands aftur, tá eg var 22, greiðir Gurun Olesen frá.

## Tað er ikki lætt í Grønlandi

Í Grønlandi arbeiddi Gudrun á ymiskum stovnum, og var í eitt tíðarskeið stuðul hjá einum deyvum drongi, sum eisini hevði trupulleikaatferð.

- Eg hevði logið, um eg segði, at tað er lætt at vera deyvur í Grønlandi. Tey fáa ikki nakra serliga hjálp, og tí verður alt sera tørført, sigur Gudrun Olesen.

Gudrun hevur eisini ein 17 ára gamlan son, sum er hoyrandi. Móðurmál hansara er teknmál, men hann tosar tó ikki heilt sum tey deyvu.

- At siggja hoyrandi tosa teknmál, er eitt sindur sum munurin á donskum og gøtudonskum. Tað er sama mál, men mann leggur merki til, at okkurt er øðrvísi, flennir Gudrun.

## Arbeiðir á sambýli

Fyri nøkrum árum síðani flutti Gudrun Olesen til Føroyar, her hon flutti saman við manninum hjá sær, sum er føroyingur. Sindur seinni fekk Gudrun starv sum heilsuhjálpari á eldrasambýlinum oman Hoydalar.

Á stovninum eru øll hoyrandi, men tað sær Gudrun ikki sum nakran trupulleika.

- Tey eru so øgiliga fitt. Tey skifta fegin yvir til danskt, sum eg ofta klári at munnavlesa, um tey tosa týðiliga, greiðir Gudrun frá.

Sum skilst á Gudruni vóru onkrir smávegis trupulleikar, men hetta broyttist tá leiðari kom á eldrasambýlið.

- Nú gongur ordiliga væl, og mær dámar øgiliga væl at arbeiða har. Tey á stovninum eru øgiliga hjálpsom, og kann tolkur ikki vera til ein fund, sum er ásettur, verður fundurin fluttur, fortelur Gudrun.

## Mugu hava kontakt við hoyrandi

Eisini greiðir Gudrun frá, at vit skulu vera sera errin av tí, vit hava í Føroyum. Og at tað veruliga kom óvart á, tá hon kom til Føroyar, tí her eru ongi arbeiðsleys deyv.

- Størsti munurin millum deyv í Føroyum og Danmark, er í veruleikanum, at tey deyvu í Føroyum mugu vera saman við hoyrandi. Tað eru so fá deyv í Føroyum, at mann ikki kann gera sær eina sermentan á sama